# »Gullhornið« lopfjølin inn í eina oljuframtíð

*Tað er ógvuliga umráðandi fyri føroysku oljumenningina, at vit fáa í lag eina munadygga leiting, t.e. leitiboringar, eftir kolvetnum á teimum minni váðafullu økjunum, tí her liggur lykilin til seinni at seta í verk leiting, har basaltini eru tjúkkri. Sagt við øðrum orðum, so er landssynningshornið av føroyska landgrunninum lopfjølin inn í eina møguliga oljuframtíð sigur landsstýrismaðurin í oljumálum Eyðun Elttør, nú føroyingar standa á gáttina til eina ta størstu og mest spennandi avbjóðingina í landsins søgu.*

JAN MÜLLER

Nú landsstýrismaðurin í oljumálum hósdagin fer at handa fyrstu leitiloyvini til oljufeløg kundi verið áhugavert at trivið í nakað av tí hann førdi fram undir orðaskiftinum um løgmansrøðuna. Eyðun Elttør boðaði tá m.a. frá, at arbeiðið at viðgera 22 umsóknir frá 17 feløgum, sum dekkaðu umleið helvtina av tí útbodna økinum, varð gingið nógv betri enn mett, og bar til at framskunda dagin at lata hesi loyvi. Hann nam so eisini við ta sera hørðu kappingini, sum hevur verið um teir bestu teigarnar.

-Tað er einki yvir at dylja, at kappingin um ávís øki er ógvuliga hørð og stór umskaring er millum ymisku umsóknirnar. Samlaða økið, sum søkt er um, er tí ikki so stórt, sum talið av umsóknum kundi givið eina ábending um. Søkt er um umleið eina helvt av økinum, sum boðið varð út. Eisini er tað hent, at onkur umsøkjari er farin uppí bólk við øðrum umsøkjara, og hevur tí tikið sjálvstøðugu umsókn sína aftur. Talið av veittum loyvum verður tí munandi lægri enn talið av innkomnum umsóknum.

Í útbjóðingarlógini varð lagt upp til, at arbeiðast skuldi við tveimum loyvisskeiðum, einum 6-ára loyvisskeiði og einum 9-ára loyvisskeiði. Hetta var ein ásannan av, at útboðsøkið er sett saman av nøkrum fáum teigum, har lítið ella



einki basalt forðar veruligari oljuleiting, og eitt 6-ára loyvisskeið tí er nóg mikið til at fremja eina munagóða leitiætlan.

Hinvegin vísti landsstýrismaðurin á, so eru tíverri flestu teigarnir klæddir við tjúkkum basaltfláum, og har er neyðugt við nøkrum árum afturat til ymiskar innleiðandi kanningar, áðrenn støða verður tikin til møguligar leitiboringar. Í innkomnu umsóknunum gerst tað púra greitt, at oljufeløg bara eru sinnað at átaka sær boriskyldur á teimum lutfalsliga fáu teigunum, sum Oljumálastýrið frammanundan roknaði við.

### Hornið er lopfjølin

-Lat meg beinanvegin gera greitt, at hetta ikki merkir, at føroyski landgrunnurin sum heild ikki kann vera áhugaverdur hjá oljuvinnuni. Tað kann hann uttan iva sum frálíður, men hetta er í ávísan mun knýtt at frambrotum innan seismiskar kanningar, tøkni o.s.fr. Her og nú er tað ógvuliga umráðandi fyri føroysku oljumenningina, at vit fáa í lag eina munadygga leiting, t.e. leitiboringar, eftir kolvetnum á teimum minni váðafullu økjunum, tí her liggur lykilin til seinni at seta í verk leiting, har basaltini eru tjúkkri. Sagt við øðrum orðum, so er landssynningshornið av føroyska landgrunninum lopfjølin inn í eina møguliga oljuframtíð.

Landsstýrismaðurin vísti annars á, at tað er ov tíðliga at siga nakað endaligt um, hvussu nógvar leitiboringar talan kann gerast um, men hann metti, at góðir møguleikar eru fyri at fáa eina skilagóða leiting setta í verk og talan verður í hvussu er um nakrar leitiboringar. Roknað verður við, at fyrstu boringarnar verða komandi ár.

Í útlendskum fjølmiðlum, sum skriva um oljuvinnu, verður stundum skrivað um leiting á føroyskum økjum. Tað er einki yvir at dylja, at úrslitini vestan fyri Hetland og Hebridurnar hava verið lakari í ár, enn menn høvdu vónað. Okkurt tíðarrit hevur tí nevnt, at vónirnar til Atlantsmótið nú eru knýttar at boringum á føroyskum øki komandi ár.

Til hetta segði Eyðun Elttør, at tað kann nú vera at so er, men úrslitini higartil í ár eiga eisini at minna okkum um, at hóast oljuvinnan og okkara egnu jarðfrøðingar meta tað sannlíkt, at olja fjalir seg í undirgrundini, so er júst ikki talan um annað enn møguleikar ella sannlíki til oljan er funnin og staðfest er, at nøgdirnar eru somikið stórar, at framleiðsla spyrst burturúr. Vanliga útsøgnin um, at »oljufeløgini høvdu ikki verið her, um tey ikki vistu okkurt« dugir ikki til at byggja sína framtíð á, tí oljuvinnan er altíð á veiðuferð eftir nýggjum oljukeldum at seta í staðin fyri tær gomlu.

-Hjá okkum ræður framhaldandi um, at fyrireika okkum sum um tað er olja, men bera okkum at sum um hon ikki er.

### Fyritøkur fyrireika seg

Fleiri føroyskar fyritøkur hava longu fyrireikað seg væl til avbjóðingarnar, ið oljuvinnan setir. M.a. hava nakrar fyritøkur fingið góðskustýringsskipanir fyri at nøkta krøvini, ið oljuvinnan setir til sínar veitarar, og dømi eru um, at føroyskar fyritøkur longu nú arbeiða í bretsku og norsku oljuvinnuni. Hendan gongdin vísir, helt landsstýrismaðurin fyri, at føroyskt vinnlív tekur við møguleikunum, sum nýggja vinnan gevur og hann helt fram:

-Oljuleitingin, sum nú byrjar á føroyskum øki, gevur føroyskum vinnulívi nakrar nýggjar møguleikar, hóast vit rokna við, at virksemið fyrstu árini verður bæði avmarkað og óstøðugt. Landsstýrið leggur stóran dent á at tryggja, at føroyskar fyritøkur sleppa uppí part, tá talan verður um veitingar til loyvishavarar á føroyskum øki. Samstundis leggja vit stóran dent á at tryggja, at loyvishavarar á føroyskum øki eru við til at fjøltátta og altjóðagera føroysku vinnuna, soleiðis at partar av okkara vinnulívi kunnu klára at kappast um arbeiðsuppgávur í oljuvinnuni í okkara grannalondum.

Málið eigur at vera, at leitiskeiðið — um oljuframleiðsla ikki spyrst burturúr — førir til eina burðardygga førleikamenning, ið kemur at lætta um atgongdina hjá føroyskum fyritøkum, tá ið tær søkja sær marknaðir uttanfyri Føroyar. Í treytunum, sum verða settar loyvishavarum á føroyskum øki, er tí ásett, at skipast skal fyri førleikamenning í føroyskum vinnulívi.




*Tað ljóðar, at blokkarnir 16 og 17 í syðsta enda av landssytnningshorninum tætt við oljuleiðirnar á bretskum øki eru teir mest umbidnu*

# Hava fyrireikað okkum væl

JAN MÜLLER

Eyðun Elttør nam eisini undir viðgerðini av løgmansrøðuni við tað drúgva fyrireikingararbeiðið, sum er gjørt undan fyrstu loyvisgevingini. Hann vísti á, at tað frá almennari síðu eru gjørdar nógvar fyrireikingar til oljuleiting, ikki bara í Oljumálastýrinum og Jarðfrøðisavninum, men í umsitingini sum heild. Her kann serliga verða nevnt arbeiðið, sum í løtuni verður gjørt í sambandi við tilbúgvingarætlanina. Talan er um eina rættiliga fjølbroytta verkætlan, ið flestu aðalstýrini onkursvegna eru uppí, t.d. verður ætlanin fyriskipað av Vinnumálastýrinum, Fiskimálastýrið hevur ábyrgdina av tilbúgvingini til havs, Almanna- og heilsumálastýrið av m.a. sjúkrahústilbúgvingini, Løgmansskrivstovan av møguligum lógarbroytingum og millumlandaviðurskiftum, meðan Oljumálastýrið hevur ábyrgdina av tí partinum, sum beinleiðis hevur við frálandsvirksemið at gera. Sum heild gongur hetta arbeiðið væl, men talan er um eina stóra uppgávu, sum krevur gott samstarvsstev millum allar teir luttakandi partarnar segði landsstýrismaðurin.

Áðrenn uppskotið um fyrsta útbjóðingarumfarið varð latið løgtinginum seinasta heyst helt landsstýrismaðurin ein fund við reiðara- og manningarfeløgini, har greitt var frá útboðsøki og væntaðum virksemi. -Tað er sera umráðandi, at vit allatíðina kunna um oljuvirksemið, soleiðis at fiskivinnan og oljuvinnan kunnu samstarva so skynsamt sum møguligt. Ætlanin er tí seinni í heyst at skipa fyri líknandi fundi, har greitt verður frá, hvørjar avleiðingar oljuleitingin, t.e. bæði leitiboringar og seismikkur, kann hava fyri fiskiskap á leiðunum, har leitað verður. Møguliga eigur eitt fast samstarvsforum at verða skipað. Sambært kolvetnislógini skal ein endurgjalds- og skaðabótanevnd setast við umboðum fyri fiskivinnufeløgini og loyvishavarar til oljuleiting. Oljumálastýrið fer at taka stig til, at henda nevndin verður mannað skjótast møguligt.

Sambært kolvetnislógini skal landsstýrismaðurin annaðhvørt ár lata løgtinginum eina frágreiðing, ið skal vera grundarlag undir einum oljupolitiskum orðaskifti á løgtingi. Tá útbjóðingarlógin varð løgd fyri løgtingið í fjør, nevndi Eyðun Elttør, at hon kom ístaðin fyri frágreiðingina, sum av røttum átti at verið løgd fram fyrstu ferð í 1999. Samstundis varð nevnt, at ætlanin var at lata løgtinginum eina frágreiðing, tá leitingarloyvini eru latin. Miðað verður eftir at gera eina frágreiðing, sum kann fevna eitt sindur breiðari enn bara um sjálva loyvisveitingina. Ætlanin er at greiða frá tí sum longu er hent á oljuøkinum, t.d. umhvørviskanningum, granskingarætlanum, útbúgvingum, vinnumenning o.s.fr. Í øðrum londum verður ætlað um ókendu kolvetnisnøgdirnar — t.e. nøgdir, ið ikki eru staðfestar við boringum — men nøgdir, sum mettar verða at fjala seg í undirgrundini. Slíkar metingar hava vit higartil ikki gjørt í Føroyum, m.a. tí torført er at ætla um hesi viðurskifti á basaltøkjunum.

Frágreiðingin í heyst fer at geva eitt boð uppá, hvørjar kolvetnisnøgdir talan kann vera um í pørtum av føroyska økinum.



# Atlantsmótið á vegamóti

*Boringar á leiðunum millum Hetland og Føroyar seinastu tíðini hava ikki givið nøkur úrslit, tó er stórur spenningur um eina boring hjá ExxonMobil tætt upp at føroyska markinum. Keldur vilja vera við, at felagið hevur gjørt eitt risastórt gassfund. Nú eru so flestu eygu vend móti Føroyum og fyrstu útbjóðingini.*

JAN MÜLLER

Tað hevur ikki gingið so væl við oljuleitingini á Atlantsmótinum ella rættari vestari fyri Hetland hetta seinasta árið. Hetta og tann sannroynd, at ætlaða útbjóðingin í bretskum øki er vorðin nakað seinkað hava gjørt, at oljuídnaðurin ikki minst í Bretland eygleiðir komandi leitisgeving á føroyskum øki við stóru áhuga. Tað eru tey, sum siga, at hava oljufeløgini ikki eydnuna við sær á føroyska partinum av Atlantsmótinum, so fer altjóða oljuheimurin at avskriva Atlantsmótið sum eina komandi oljuprovins. Hinvegin verður eisini mett, at leiting og fund á føroyskum øki, kunnu birta nýggjar vónir til alt økið.

Í fjør vórðu boraðir fimm kanningarbrunnar á djúpum vatni vestan fyri Hetland, og allir vóru teir turrir. Feløgini, sum boraðu, vóru Enterprise, Marathon, Texaco og Agip. Hetta eru somu feløg, sum vit finna millum umsøkjararnar á føroyskum øki.

Hóast hesi vána úrslit er tað kortini ein boring, sum er í gongd í løtuni, ið vekir rættiliga stóran áhuga. Tað er oljurisin ExxonMobil, sum borar við pallinum Jack Bates triðja árið á rað í blokkinum 214, ið liggur norðan fyri verandi oljufeltini Foinaven og Schiehallion og so tætt upp at føroyska markinum hugsast kann. Keldur, sum Sosialurin hevur tosað við, halda, at tað er ikki útilokað, at ExxonMobil í fjør gjørdi eitt risastórt gassfund júst á hesi leiðini. Felagið hevur tó einki viljað sagt. Í oljuheiminum verður júst hetta møguliga fundið mett at kunna fáa lív í aftur Atlantsmótið.

Tað eru funnin fleiri smærri gassfelt vestan fyri Hetland so sum Victori og Torridon, men tað skal eitt stórt gassfund til fyri at fáa eina lønandi framleiðslu í gongd. Tað liggur eisini ein umfatandi verkætlan og bíðar, sokallaða Auroraprojektið, um stórar nøgdir av gassi verða funnar. Tá er so ætlanin at knýta ymsu gassfeltini saman og flyta gassið til eina støð í Skotlandi, har tað verður viðgjørt til víðari nýtslu. Hava ExxonMobil gjørt eitt stórt gassfund, so kann henda verkætlanin gerast veruleiki.

### Clair spøkir aftur

Annars verða stórar vónir settar til eina útbygging av Clairfeltinum, sum varð funnið í 1978 men sum orsakað av ymsum forðingum, sum tó við nútímans tøknini í dag ikki eru so stórar, ongantíð er sett at fara undir framleiðslu. Nú er øðrvísi. BP og onnur feløg arbeiða í løtuni við at velja millum ymsar palloysnir, og roknað verður við, at ein framleiðsla kann byrja frá hesum risastóra oljufeltinum um eini trý ár. Tað kann so aftur fáa stóran týdning fyri alt økið sum tað er.

Eisini verður arbeitt við eini ætlan at leggja eina rørleiðing frá Foinaven og Schiehallion feltunum at flyta gass fyrst til lands í Hetlandi og síðani víðari til oljufeltið Magnus í Norðsjónum. Endamálið við hesum er fyri tað fyrsta at loysa trupulleikan við avlopsgassinum og síðani at brúka gassið frá hesum feltum til at trýsta upp oljuna í Magnusfeltinum.

Tað er greitt, at verður nakað av øllum hesum og verður olja og gass funnið við Føroyar, so kann hetta samanlagt skapa eina heilt nýggja og týðandi oljuprovins á Atlantsmótinum, sum so aftur fer at draga mong onnur av heimsins stóru oljufeløgum til økið við íløgum.

Men tað kann ganga báðar vegir. Hinvegin er eingin ivi um, at vit í løtuni eru á einum týðandi vegamóti. Og nettupp dagurin 17. august, sum verður hildin í Norðurlandahúsinum, við handan av fyrstu loyvunum á føroyskum øki, er ein avgerandi partur av hesum vegamóti.



# Vaksa um kirkjugarðin á Skála

*Um eina góða viku verður arbeiðið við at vaksa um kirkjugarðin á Skála liðugt*

SVEINUR TRÓNDARSON

**Skála:** Nú fer arbeiðið við at vaksa um kirkjugarðin á Skála, at nærkast endanum. Í eina tíð hevur verið arbeitt við at byggja garðin út, men um eina góða viku verður arbeiðið liðugt, sigur Símun Pauli Berg, bygdaráðsformaður.

- Tað var ætlanin, at arbeiðið skuldi vera liðugt um mánaðarskiftið august september og tað fer at vera á góðari leið, sigur hann.

Tað er ikki av ongum, at kirkjugarðurin á Skála verður bygdur út. Tað var vorðið heldur enn ikki trongligt í verandi garði, og tí var neyðugt at fara undir útbyggingina.

Bygdaráðsformaðurin vil ikki siga nakað endaligt um, hvussu nógv útbyggingin kostar, tí tað hava tey ikki yvirlit yvir enn.

- Tað er tí, at kostnaðurin hongur saman við talinum av kubikkmetrum og tað kenna vit ikki nágreiniligt enn. Men kostnaðarmetingin segði umleið eina hálva millión, og tað fer ivaleyst at vera á góðari leið, sigur Símun Pauli.

Annars rendu teir seg í ein trupulleika eftir at farið var undir útbyggingina av kirkjugarðinum. Ov lítið av mold var í lendinum og tí var neyðugt at fara út at leita eftir mold. Tað er synd at siga, at tað er stórt byggivirksemið í bygdini, so har var eingin mold at heinta. Tí vóru einastu ráðini, sum vóru til at taka, at fáa loyvið frá Meinigheitshúsinum, at grava moldina av teirra stykki, longri inni í bygdini, og tað loyvið fekk bygdaráðið uttan stórvegis hóvasták.

*Er so nóg mikið av mold til taks, tá tað stykkið er avgrivið?*

- Til tann partin av garðinum vit gera nú er tað, sigur bygdaráðsformaðurin.

- Tað hevði ikki verið nóg mikið um vit bygdu alt út, sum møguligt er, men til henda partin er tað, sigur Símun Pauli.

Hann greiðir frá, at sandur verður blandaður upp í moldina, og tí fer at vera akkurát fyri tá liðugt er.

Vanliga verður sagt, at tá ein ger kirkjugarð, so skal garðurin liggja órørdur í tvey ár. Sambært bispi er tað ikki nøkur kirkjulig treyt, at kirkjugarðurin liggur, men tað er nokk meira siðvenja og so tann veruleiki, at moldin søkkur rættuliga fitt eftir at hon er løgd út. Tí er skilagott at lata garðin liggja eina tíð, soleiðis at moldin er fallin upp á pláss, og vandin fyri at tað gerst í grynra lagið er burtur.

Á Skála vita tey kortini ikki, um tað verður neyðugt at taka garðin í nýtslu áðrenn tvey ár eru farin, men tað er veruleiki, at tað er trongligt í verandi garði, staðfestir Símun Pauli Berg.



*Arbeiðið við at byggja út kirkjugarðin á Skála er nú komið so langt, at bygdaráðsformaðurin væntar at tað verður liðugt um eina viku ella so. Og so verður aftur pláss í kirkjugarðinum.*

**Mynd: Sveinur Tróndarson**



***Skála:*** *Hóast tað ikki var ætlanin at byrja beint nú, so eru menn byrjaðir at grava út fyri nýggja meinigheitshúsinum á Skála. Ov lítið var av mold í kirkjugarðinum, sum verður bygdur út í løtuni, og tí mátti kommunan fáa sær mold aðrastaðni frá. Meinigheitshúsið verður væntandi liðugt um eitt ár, ella so.*

**Mynd: Sveinur Tróndarson**